gult cyan magenta svart




Elkeyp

ÚTSØLAN BYRJAR LEYGARDAGIN







Vaskimaskinur

| Merki | Vørunr. | Dygd | Vanl. prísur | ÚTSØLA |
|---|---|---|---|---|
| Zanussi | FLS1072 | 1000 sn./min | 3.500,00 | 2.895,00 |
| Blomberg | WA1630 | 1150 sn./min | 7.290,00 | 5.795,00 |
| AEG | 72630 | 1200 sn./min | 9.295,00 | 6.495,00 |
| ASKO | W6430 | 1400 sn./min | 8.995,00 | 6.895,00 |
| Siemens | WM71730 | 1400 sn./min | 10.495,00 | 8.895,00 |

Turkitrumlur

| Merki | Vørunr. | Dygd | Vanl. prísur | ÚTSØLA |
|---|---|---|---|---|
| Blomberg | TA435 | tíðarstýrd | 3.890,00 | 2.895,00 |
| Creda | 37630 | tíðarstýrd, kondens, 6 kg | 3.825,00 | 3.295,00 |
| Zanussi | TDS372T | tíðarstýrd | 3.295,00 | 2.695,00 |
| Bauknecht | TRA5350 | elektroniskt stýrd | 5.795,00 | 4.495,00 |
| AEG | 56600 | elektroniskt stýrd, kondens | 9.495,00 | 6.995,00 |



Komfýrar

| Merki | Vørunr. | Dygd | Vanl. prísur | ÚTSØLA |
|---|---|---|---|---|
| Gorenje | HE142W | trad. komfýrur | 4.390,00 | 3.695,00 |
| Siemens | HS29023 | ker. kókiplátur | 6.495,00 | 5.795,00 |
| ASKO | C956 | ker. kókiplátur | 9.690,00 | 6.795,00 |
| Electrolux | EK6173 | ker. kókiplátur, db. ovn | 22.500,00 | 16.495,00 |
| Voss | EL2000-1 | ker. kókiplátur v/dig. klokku | 17.300,00 | 12.295,00 |



Uppvaskimaskinur

| Merki | Vørunr. | Dygd | Vanl. prísur | ÚTSØLA |
|---|---|---|---|---|
| ASKO | D1976 | 12 persónar | 7.795,00 | 6.195,00 |
| Siemens | HS29023 | 12 persónar, elektriskt prog. | 8.595,00 | 7.795,00 |
| Zanussi | DW6814 | 12 persónar, 3 prog. | 3.595,00 | 3.195,00 |
| Bauknecht | GSF404 | 12 persónar | 5.295,00 | 3.895,00 |
| Siemens | SE24262 | 12 persónar, elektriskt prog. | 7.895,00 | 5.895,00 |



Køli/frystiskáp

| Merki | Vørunr. | Dygd | vanl. prísur | ÚTSØLA |
|---|---|---|---|---|
| LEC | U250WS | Frystiskáp h.: 63, b.:50, d.: 51 | 2.695,00 | 2.095,00 |
| Vestfrost | CKS250 | Køliskáp h.: 125, b.:60, d.: 60 | 4.990,00 | 4.095,00 |
| LEC | T062W | Køli- & frystiskáp h.: 188, b.:60, d.: 60 | 10.995,00 | 6.195,00 |
| Zanussi | TZ155 | Køliskáp h.: 85, b.:55, d.: 60 | 2.695,00 | 2.195,00 |
| Gorenje | R2906CLB | Køliskáp h.: 143, b.:60, d.: 62 | 4.590,00 | 3.195,00 |



Mikroovnar

| Merki | Vørunr. | Dygd | vanl. prísur | ÚTSØLA |
|---|---|---|---|---|
| Bauknecht | MCCD4920 | 23 L v/dig. stýring | 2.950,00 | 2.295,00 |
| Whirlpool | MT228 | 24 L v/dig. stýring v/luft | 4.295,00 | 3.495,00 |
| OBH | 7520 | 20 L micro og grill | 1.595,00 | 1.095,00 |


gult cyan magenta svart



# Vinnuligt samstarv við Evropa

**Føroyska vinnulívið skal víðka sjónarringin enn meira. Tí hevur Føroya Landsstýri gjørt av at fara uppí eina økismenningarætlan, sum ES skipar fyri. Her ber til hjá vinnufyritøkum at fáa stuðul til ymsar verkætlanir**

VINNULÍV
*Stefan í Skorini*

Hósdagin seinnapartin skipaði Føroya Landsstýri saman við Løgmansskrivstovuni og Norrønum Atlantssamstarvi (NORA) fyri einum kunningarfundi í Norðurlandahúsinum.

Endamálið var at kunna føroyska vinnulívið um teir møguleikar, ið standa teimum í boði í tveimum vinnuframaskipanum, sum Føroyar luttaka í.

Tað var Kjartan Hoydal, sum vegna NORA kunnaði fundarluttakararnar um tey tilboð og møguleikar, sum vinnulívið hevur í hesum samstørvum.

Føroya Landsstýrið hevur fingið innbjóðing úr Skotlandi í fjør um at vera við í evropeisku menningarætlanini "Northern Periphery" ella "Norðurmót" á føroyskum, og landsstýrið hevur tikið av hesi innbjóðing.

Hetta er ein menningarætlan, ið er sett í verk av ES-londunum. Lond uttan fyri ES kunnu tó eisini luttaka, um tey verða boðin við í menningarætlanina. Økini, sum eru við í hesi menningarætlan, eru Grønland, Føroyar, Norðurskotland, Norðurnoreg, Norður-Svøríki og Norðurfinland.

Frammanundan eru Føroyar limir í NORA, sum er ein stovnur undir Norðurlanda Ráðharraráðnum. Hetta er eitt økissamstarv, ið fevnir um Grønland, Ísland, Føroyar og Strandanoreg. Her ber eisini til at søkja um stuðul.



*Kjartan Hoydal kunnaði fundarluttakararnar um møguleikarnar hjá føroyskum vinnulívi í vinnuframaskipanum . Hetta er ein góður møguleiki hjá fyritøkum at fáa samband í grannalondunum*

*Mynd: Jens Kr. Vang*

## Skapa sambond

– Norðurmót er eitt tilboð til føroyska vinnulívið um at fáa stuðul til menning og gransking. Føroyska vinnulívið er ikki eins væl fyri sum vinnulívið í okkara grannalondum við viðvíkjandi atgongd til umhvørvi , har man fæst við menning og gransking, tí vit hava avmarkað umhvørvi í Føroyum. Við at skapa sambond við grannalondini, ber til at menna føroyska vinnulívið, sigur Kjartan Hoydal, sum legði fram á fundinum.

Føroyar hava ikki verið við í eini økismenningarætlan hjá ES fyrr, so hetta er ein nýggjur møguleiki hjá vinnulívinum at fáa samband við vinnufyritøkur aðrastaðni í Norðurevropa.

Í hesum nýggja samstarvinum ber eisini til at fáa samband við fyritøkur í Finlandi, Svøríki, Noregi og Skotlandi, og tað kann gerast ein gyltur møguleiki hjá fyritøkum í Føroyum.

– Endamálið er at vit, eftir ynski frá vinnufyritøkum, sambinda vinnulívið við menningar- og granskingarumhvørvið í londunum, sum eru við í ætlanini. Endamálini hjá NORA og Norðurmóti eru tí ógvuliga lík hvørjum øðrum, sigur Kjartan Hoydal.

Krøvini til vinnufyritøkur, sum søkja um stuðul, eru, at tær hava ætlanir um at fara undir samstarv við fyritøku í einum øðrum landi, ið eisini er við í samstarvinum. Stuðul verður vanliga ikki játtaður til fyritøkur, sum ikki hava samstarv út um egið landamark í hyggju. Talan skal helst vera um samstarv.

– Vert er at hava í huga, at grannalond okkara seta nógv meira pening av til gransking og menning. Til dømis játtar Svøríki 3,5% av bruttotjóðarúrtøkuni til hetta økið. Føroyar og Grønland játta bara 1%, so hetta er eitt gott høvi at økja um pengamøguleikarnar, sum eru til gransking og menning í Føroyum, sigur Kjartan Hoydal.

Játtaðar verða í mesta lagi 500.000 krónur um árið í mesta lagi trý ár. Fyritøkan, sum søkir um stuðul, skal sjálv fáa minst helvtina av peninginum til vega.

Fíggjarætlanin hjá NORA er á 5,5 milliónir krónur um árið, meðan Norðurmót arbeiðir við eini 50 milliónum um árið, tí hetta fevnir um eitt størri øki.

NORA fær vanliga eini 60 umsóknir um árið, men bara eini 15-20 umsóknir verða gingnar á møti.

NORA fer at lýsa eftir umsøkjarum um mánaðarskiftið, meðan møguleiki verður at søkja um stuðul frá Norðurmót í heyst.

Annars ber til at fáa fleiri upplýsingar um hesar vinnuframaskipanir á heimasíðuni hjá NORA, www.nora.fo, ella við at venda sær til skrivstovuna.

# Pippi varð avlýst

**Undir framførsluni av sjónleikinum Pippi mikukvøldið varð neyðugt at steðga sjónleikinum, tí høvuðsleikarin, Pippi, gjørdist illa fyri undir sýningini. Annars er hesin sjónleikurin við at seta nýtt met, hvat tali av sýningum viðvíkur**

SJÓNLEIKUR
*Stefan í Skorini*

Teir áskoðarar, sum høvdu leitað sær í sjónleikarhúsið mikukvøldið, sóu tíverri ikki allan sjónleikin.

Orsøkin var, at Pippi sjálv knappliga gjørdist illa fyri beint eftir ein tátt á pallinum, og leikurin varð tí avblástur.

– Tað hendi ikki meira enn tað, at eg fekk andaneyð gjørdist eitt sindur illa fyri, sigur Beinta Clothier, sum nú hevur spælt Pippi 46 ferðir.

Sjúkrabilurin kom á staðið, men tá var alt yvirstaðið aftur. Beinta fór aftur til arbeiðis dagin eftir og hevur tað annars fínt.

Pippi verður aftur á skránni leygardagin klokkan 16. Enn er møguleiki at síggja leikin, tí sjey sýningar eru eftir á skránni.

– Tá hesar sjey sýningarnar eru lidnar, so haldi eg, at tað er liðugt við Pippi á hesum sinni. Fólk orkar kanska ikki Pippi meira, og leikararnir hava eisini onnur ting at gera. Vit mugu gevast, meðan vit enn eru á toppinum, sigur Beinta.

Leikurin var fyrstu ferð sýndur 21. oktober í fjør, og tá tey eru liðug, hava leikararnir verið 53 ferður á palli. 125 fólk kunnu hyggja eftir hvørjum leiki, og tað hevur verið útselt hvørja ferð. Hetta er nýtt met í Føroyum.

# Landsstýrið setir ikki pengar í Smyril Line

SMYRIL LINE
*Jústinus Leivsson Eidesgaard*

Beint fyri midddag í gjár, komu boðini úr landsstýrinum, at landsstýrið er ikki sinnað at seta meiri pening í Smyril Line.

Tað eydnaðist okkum ikki fáa fáa orð á Bjarna Djurholm, landsstýrismann, fyri at fáa staðfest grundgevingarnar hjá landsstýrinum.

Eykaaðalfundur verður í Smyril Line 9. februar og tá skal støða takast til at hækka partapeningin heilt upp til 120 mill. kr. 60 milliónir eru longu innkomnar. Tær eru frá hetlendska Menningargrunninum við 50 mill., 5 mill. frá íslendska Menningargrunninum og 5 mill. frá felagnum, sum avgreiðir Norrønu á Seyðisfirði.


ÚTSØLA

hjá Skilling í SMS



Útsølan heldur fram

Brillustell 10 kr,-
við keyp av gløsum

Brillustell -50 %

Kikarir -20%

Brillustel sum ikki eru á útsølu -20%
Tó ikki Air brillurnar

SKILLING

SMS · Tel 31 56 56 · Fax 31 86 87